## Grækarismessa í Århus

Føroyingafelagið í Århus skipar fyri grækarismessuhaldi mánadagin 12. mars klokkan 17. Har verður fyrst felagssangur, síðani fer Finnur Jensen at halda røðu, og nýstovnaða Áarstovukórið fer at syngja nakrar sangir. Kaffi og køkur verða sjálvandi eisini at fáa, siga fyrireikararnir, sum vóna at síggja øll, ung sum eldri, í hølunum í Áarstovu til tiltakið. Aftan á grækarismessuhaldið hevur føroyingafelagið eykaaðalfund.

## Á útlendskar hendur

Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur og fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum, mælir til, at Føroya Banki verður seldur útlendskum íleggjarum. Í lesarabrævi skrivar Hermann Oskarsson, at tað er skeivt av tí almenna at leggja einskiljingina soleiðis til rættis, at bankin verður verandi á føroyskum hondum. Hansara uppskot er, at vit skulu hava ein so óføroyskan banka, sum til ber, og tað gerst við fullari liberalisering av fíggjatmarknaðinum.

# ip í sjónum

» *Teir hava tað so gott umborð á teimum stóru skipunum. Har hava teir alt – sauna, internet og annað*



*- Eg havi fingið millum 100 og 150 pund uppá stampin, sigur útróðrarmaðurin, Richard Hentze av Sandi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*Gott er at hava línubustirnar í lagi. Tær skulu skiftast við millum, og tað gjørdi Richard hósdagin í farnu viku*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

útróðrarmaðurin heiman av Sandi.

Tá hann fer frá landi er hann bæði eystanfyri og vestanfyri, alt eftir, hvussu ættin er.

### Allir egndir

Tá ein er útróðrarmaður og rekur fiskivinnu, slítast amboðini eisini umborð.

Henda morgunin, vit hittu hann umborð, var hann í ferð við onkrar smærri umvælingar umborð.

– Línubustirnar eru vorðnar so slitnar, at her gerst ikki annað enn at skifta tær, sigur Richard.

Í aðrar mátar vóru allir stamparnir egndir, so hann var klárar at leggja frá landi seinni um kvøldið.

## FAKTA

| | |
|---|---|
| **Navn:** | Syðraberg SA 300 |
| **Bygdur:** | 2004 hjá AWI Boats í Runavík |
| **Maskina:** | http://www.skipalistin.fo/Search.asp?MaskinSlag=88" Perkins Sabre |
| **Maskinorka:** | 195 KW / 265 HK |
| **Longd:** | 10, 20 metrar |
| **Breidd:** | 3,44 metrar |
| **Dýpd:** | 1,39 metrar |
| **BT:** | 7.10 |
| **NT:** | 2.10 |

## Eitt gott lív

Nú veit Richard rættiliga nógv um, hvussu tað er at vera útróðrarmaður.

Hann er altíð einsamallur avstað, tí tað er so trupult at fáa fólk við.

– Tað er eitt gott lív at vera útróðrarmaður, skal eg siga tær.

– Ein avgerð fullkomuliga sjálvur, nær ein fer avstað og nær ein kemur aftur, sigur Richard við einum brosi.

## Munur á bátum

Sum nevnt aðrastaðni á síðuni, kennir Richard eisini til trupulleikan at fáa fólk umborð á bátarnar.

– Nei, tað er næstan ógjørligt, sigur hann.

Sambært honum eru menn í øðrum arbeiðum. Haraftrat vísir tað sera trupult at fáa teir ungu menninar við til útróðrar.

– Teir hava tað so gott umborð á teimum stóru skipunum. Har hava teir alt – sauna, internet og annað.

– Tá er munur á einum lítlum útróðrarbáti heima á Sandi, slær Richard fast.